# Uttanríkis- og vinnumálaráðið søkir eftir løgfrøðingi til vinnudeildina

Søkt verður eftir løgfrøðingi til vinnudeildina í Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.

**Starvið**
Arbeiðið fevnir m.a. um

- at fyrireika lógaruppskot og kunngerðir
- at luttaka í og leiða verkætlanir
- at ráðgeva landsstýrismanninum
- at samskifta við og stuðla stovnum undir Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Vit bjóða eitt áhugavert, fjølbroytt og avbjóðandi starv í einum umhvørvi á høgum fakligum stigi. Starvið er krevjandi, og onkuntíð er neyðugt at taka tøk, tá á stendur. Uppgávurnar eru skiftandi og hava nógv samskifti úteftir.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava løgfrøðiliga kandidatútbúgving frá hægri lærustovni, t.e. cand.jur. ella sambæriligt prógv.

**Vit vænta, at tú hevur**:

- góð samstarvsevni
- góð analytisk evni og politiskt tev
- góð evni at samskifta bæði í skrift og talu, og
- ert tænastuhugað/ur og fleksibul, miðvís/ur og dugir at arbeiða sjálvstøðugt

Umsøkjarar, sum hava royndir frá almennari ella privatari fyrisiting, kunnu hava fyrimun.

**Løn og setanartreytir**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, CV o.ø. skulu sendast til: uvmr@uvmr.fo. Umsóknir skulu vera Uttanríkis- og vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 5. mai 2019.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Starvið verður sett frá 1. juni ella skjótast til ber. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Pól E. Egholm, deildarstjóra, tlf. 556076.

**Vinnudeildin** skal tryggja góðar og stimbrandi karmar fyri føroyskt vinnulív og hevur ábyrgdina av vinnuliga lógarverkinum. Millum virkisøkini hjá vinnudeildini eru alivinna, sjóvinna, útlendingamál, integrasjón, ferðavinna, gistingarhús- og matstovuvinna, loftferðsla, fjarskifti, matvøruframleiðsla og -útflutningur, djór og djórvælferð, kappingarmál, kolvetni, vinnufeløg, íverksetan og skapandi vinnur.

Vinnudeildin varðar av fleiri almennum stovnum og partafeløgum: Føroya Tele, Atlantic Airways, Vága Floghavn, Visit Faroe Islands, Posta, Fiskaaling, Rúsdrekkasølu Landsins, Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Útlendingastovuni, Skráseting Føroya, Kappingeftirlitinum, Posteftirlitinum, Tryggingareftirlitinum, Fjarskiftiseftirlitinum, Jarðfeingi, Sjóvinnustýrinum, Vinnuframa og Framtak.

GONGIN 7 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 30 66 00 • TELEFAX 30 66 65 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO